Vit hava tørv á ævintýrum

Tað kann tykjast óskiljandi fyri mong, at ein heil tjóð ella fleiri liggja lamnar, tí eitt kongaligt brúdleyp fer fram. Men tað heldur Eyðun Joensen, sálarfrøðingur ikki er so løgið. Hansara boð upp á orsøkina er, at øllum tørvar eitt ella annað slag av ævintýrligum upplivilsum í einum gráum og vanligum gerandisdegi

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, heldur ikki, at tað er so løgið, at fólk verða bergtikin av kongaliga brúdleypinum. – Vit hava øll brúk fyri onkrum ævintýrligum, sigur hann

Mynd: Reuters

Fríggjadagin fekk danska ríkið eitt nýtt krúnprinsapar. Fríðrikur og Mary vórðu gift í Vor Frue Kirke í Keypmannahavn. Ein stórhending, sum fekk úti við 250.000 fólk út á gøturnar í Danmark. Eisini í Føroyum fylgdu flestu fólk við, tá parið undir einari sera vakrari brúðarvígslu góvu hvør øðrum sítt ja. Manntómar gøtur og hvør handil, sølubúð, fyritøka og so framvegis mundi hava eitt ella fleiri sjónvarp tendrað hendan dagin.

Men hvat er tað so, sum hendir, tá ein slík stórhending fer fram, og hvat ger, at fólk verða so hugtikin og áhugað í hesum?

Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, heldur, at øll menniskju hava tørv á at uppliva eitt hvørt estetiskt og flott. Eitt ævintýr, sum kann fáa øll at dagdroyma eina løtu.

– Hetta er ein so sjáldsom hending. Hetta er ikki nakað, sum hendir fleiri ferðir í lívinum hjá okkum, so eg skilji tað væl, sigur Eyðun.

Hann vísir á, at føroyingar somuleiðis fylgdu væl við, tá norski krúnprinsurin, Haakon, giftist Mette-Marit.

– Áhugin hjá føroyingum fyri norska kongshúsinum er ikki eins stórur, men tá tað ikki var danski krúnprinsurin, so var tað tað næstbesta, sigur hann.

Onki er at taka seg aftur í at norska hjúnarbandið var enn meira ævintýrakent enn tað danska. Við tað at borgarliga einliga mamman fekk sín prins og kongaríkið.

Øll livdu við

Eyðun Joensen heldur, at tað, sum var áhugavert við brúdleypinum var, at øll livdu við í hendingini. Høg sum lág. Og hann sigur, at sjálvur varð hann bergtikin av øllum vakurleikanum.

– Eg haldi, at øll, sum hava tað soltið á ein ella annan hátt í gerandisdegnum, treingja til at sleppa at uppliva slíkan vakurleika og eitt tílíkt ævintýr, sum at ein krúnprinsur giftist einari púra vanligari kvinnu, sigur hann.

Fyri at seta hetta saman við tí heilt vanliga gerandisdegnum, spyr sálarfrøðingurin til dømis, hví so mong keypa romanbløð og líknandi. Hann ivast ikki í, at tað er tí, at tørvurin fyri at uppliva eitt hvørt romantiskt, vakurt, eksotiskt er tilstaðar hjá øllum í teirra vanliga lívi.

– Nú skal eg ikki fara at draga hesa hendingina fríggjadagin niður á tað støðið, men dagdroymarí er ikki óløgligt, og øll eiga at kunna droyma seg burtur eina løtu. Nevniliga tí tey hava brúk fyri tí, slær hann fast. Og hann leggur afturat, at hann fegin vil síggja tann, sum sá vígsluna fríggjadagin og ikki helt tað vera tað vert.

Menniskjasligur

Tá tosið kemur inn á krúnprinsin er sálarfrøðingurin ikki í iva um, at øll fóru frá aftur sjónvarpinum nakað ríkari enn frammanundan. Tí til vígsluna vísti buldribassin í danska kongshúsinum seg frá einari heilt aðrari síðu.

Mong mundu tey vera, ið vórðu rørd av hansara tárum, stutt áðrenn Mary saman við pápa sínum kom gangandi inn eftir kirkjugólvinum. Í sjónvarpinum sóust hann og beiggin, Joakim prinsur, standa og smápráta eina góða løtu, áðrenn brúðurin kom. Men tá bert nakrir fáir minuttir restaðu í, tóku kenslurnar ræði á tí annars altíð róliga krúnprinsinum, og tárini komu fram.

Hetta heldur Eyðun hevur gjørt, at fólk hava fingið eina aðrar mynd av krúnprinsinum.

– Eg trúgvi, at hasi tárini vóru ektað. Alt tað, sum krúnprinsurin er kendur fyri, her hugsi um hansara djørvu brøgd og allar tær venjingarnar, sum hann hevur gjøgnumført, hava givið fólki eina ávísa mynd av honum. Men fríggjadagin kom tann menniskjasliga síðan veruliga fram, sigur sálarfrøðingurin, sum sjálvur als ongar ætlanir hevði um at hyggja at brúdleypinum. Men hann setti seg eina løtu og varð fangaður av øllum tí stórbæra vakurleikanum, sum har var at síggja.

Listaverk

Eyðun Joensen heldur, at tað er mest sannlíkt, at orsøkin til, at menniskju verða so fangað av teimum kongaligu er, at líka frá barnsbeini av, tá vit hoyra søgur og ævintýr um kongar, drotningar, prinsar og prinsessur, so verður hetta so inngrógvið inn í okkum, sum nakað stórbært og flott, at tað livir í okkum allatíðina. Og tá vit so fáa ein møguleika at síggja slíkt í sjónvarpinum, so taka vit av.

Sálarfrøðingurin samanber allan vakurleikan við list.

– Um vit vilja uppliva eitt hvørt flott, so kunnu vit til dømis fara í Listaskálan á Ólavsøku, men eg haldi so sanniliga, at allir kjólarnir, prýði í kirkjuni og so framvegis vóru listaverk, sigur hann.

Við tørvinum hjá menniskjum fyri at síggja og uppliva nakað flott og ævintýrakent, sigur Eyðun seg bara kunna vera samdan í útsagninum:

"Tað, sum frøir eygað, er næstan sum ein mental veitslumáltíð." Og so leggur hann afturat, at tað er ikki av ongum, at kokkar siga, at útsjóndin av rættinum er helvtin.

Stórt trýst

Eyðun Joensen er sannførdur um, at tað nú framyvir fer at liggja eitt stórt trýst á krúnprinsessu Mary. Ikki bert hevur hon tikið hetta djarva stigið at fara frá einum púra vanligum og anonymum lívi til at vera donsk krúnprinsessa og ikki fáa flutt seg uttan at fjølmiðlarnir vita av tí.

Men eisini trýstið av, at ein arvingur helst skal síggja dagsins ljós, verður har frá nú av.

– Eg sigi bara, Gud náði hennara skinn, um hon ikki verður við barn, og tað kann nevniliga trýst gera sítt til, at hon ikki verður, sigur Eyðun.

Øll munnu minnast, hvussu ljóskastarin varð varpaður á búkin á prinsessu Alexandru í langa tíð, aftaná at tey vórðu gift. Og tað er ikki ov lítið sagt, um ikki ljóskastarin verður settur enn meira á tann flata búkin hjá krúnprinsessuni.

Eyðun minnir samstundis á, at trýstið ikki bert liggur á henni, hóast ljóskastarin óivað verður varpaður á hennara búk. Tey eru tvey, sum skulu gera barnið, so trýstið fer uttan iva eisini at liggja á krúnprinsinum, heldur hann.

Ein danskur, kvinnuligur prestur, sum sat í studionum hjá DR fríggjakvøldið, kom eisini inn á hetta, og tá segði hon, at fjølmiðlarnir mugu lata krúnprinsaparið fáa frið hesum viðvíkjandi. Tí sum hon málbar seg, eitt barn er ein gáva, ikki eitt krav.

Um donsku fjølmiðlarnir fara at gera, sum hon segði, tað kann bara tíðin vísa.

Føroyingar stuðla kongshúsinum

Ein túrur í havnargøtum mánamorgunin avdúkaði, at meirigi maðurin á gøtuni stuðlar danska kongshúsinum. Eisini kom fram, at á onkrari skrivstovu var sjálv vígslan feirað við sjampanju

MEININGAR
Orð: Terji Nielsen
Myndir: Jens Kr. Vang

Thordur Thorsteinsson, parkeringsvørður

Sigur mær ikki so nógv

Fyri Thord Thorsteinsson hevði kongaliga brúdleypi lítið at siga, men hann stuðlar tó kongshúsinum

Hugdu tú eftir brúdleypinum í sjónvarpinum?

– Eg hugdi ógvuliga lítið. Tað sigur mær ikki so nógv, og tí tímdi eg ikki at hyggja. Tó skal sigast, at eg hugdi at sjálvari vígsluni, tá ið hon var.

Hvat heldur tú um, at danir brúka hópin av peningi upp á eitt slíkt brúdleyp?

– Tað haldi eg er í lagi, tí kongshúsið er gott PR fyri Danmark. Hetta var jú eisini fyrstu ferð síðani einaferð í 1700-talinum, at eitt krúnprinsabrúdleyp var í Danmark, so tað er í lagi, at teir gera nógv burturúr.

Er tað rætt, at almennu Føroyar brúktu pengar upp á brúdleypið?

– Eg haldi tað verða í fínasta lagi, at Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen fóru niður, tí vit skulu vísa virðing fyri danska kongshúsinum, so leingi sum vit eru ein partur av kongaríkinum.

Jan Christiansen, borgarstjóri

Føroyar fáa eisini ágóða av kongshúsinum

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, heldur tað verða skilagott at dønum at gera nógv burturúr brúdleypinum, tí tað er góð reklama fyri Danmark.

Hugdi tú eftir brúdleypinum í sjónvarpinum?

– Eg hugdi í løtum, men tað var ikki fyrr enn eg kom til hús, og tá hugdi eg nakað. Meðan eg var til arbeiðis, hevði eg ikki stundir at hyggja. Eg sá tó, tá ið røðurnar vóru hildnar, og eg haldi, at serliga Prins Henrik kom serstakliga væl frá sínari, eins og John Donaldson.

Hvat heldur tú um, at danir brúka nógvar milliónir upp á brúdleypið?

– Tað er í fínasta lagi, haldi eg. Tað eru tvær orsøkir til tað eftir mínum tykki. Fyri tað fyrsta er tað vakurt, romantiskt og stórsligið, og tað skal man vænta av einum krúnprinsabrúdleypi. Harafturat er tað skilagott av dønum, tí tað er sera góð reklama fyri Danmark. Vit skulu minnast til, at hetta verður sent í sjónvarpi kring allan heim. Hetta er nakað, ið rakar beint í hjartað á fólki, og tí kemur tað at standa leingi í hugaheiminum.

Hetta setur av álvara Danmark á heimskortið, og óivað fáa føroyingar eisini ágóða av hesum.

Er tað rætt av føroyingum at brúka pengar upp á umboðan og gávu í sambandi við brúdleypið?

– Tað haldi eg avgjørt. Vit skulu vísa virðing fyri kongshúsinum, tí vit eru jú partar av kongaríkinum. Brúdleypið hevur eisini stóran áhuga millum føroyingar. Millum annað var eg á konditaríinum í morgun, sum eg eri hvønn mánamorgun, og har sótu einir 10 mans, sum vanliga tosa um fisk ella fótbólt, men í morgun tosaðu teir bara um kongaliga brúdleypið.

Eydis Næss, Mariann K. Ivansdóttir og Bjørg Schiller Jacobsen

Hugdu allan dagin

Tær trýggjar, Eydis Næss, Mariann K. Ivansdóttir og Bjørg Schiller Jacobsen, ið til dagligt starvast á Salong Tótu, vóru ógvuliga áhugaðar í kongaliga brúdleypinum

Hugdu tit eftir brúdleypinum?

– Ja, vit hugdu allan dagin. Eitt sjónvarp var sett upp í salongini, og hóast vit høvdu nógvar kundar allan dagin, var nógv skeitt yvir á sjónvarpið. Tá ið so sjálv vígslan var, reistust kundarnir úr stólunum, og øll stóðu kring sjónvarpið og hugdu at. Tá ið vit so komu til hús, var hildið fram við at hyggja, og tað var sera hugnaligt og rørandi. Serliga stuttligt var tað at hoyra røðurnar, ið vóru virkuliga góðar, eru tær trýggjar á einum máli um.

Er hetta ein gentudreymur at gerast prinsessa?

– Nei, tað er ikki nakað, ið man ynskir sær, men tað er øgiliga stuttligt at hyggja eftir. Tað hevði kanska eisini verið stuttligt at verið prinsessa í ein dag, bara fyri at royna tað, halda tær trýggjar hárfríðkanardamurnar.

Hvat halda tit um alt hóvastákið við danska kongshúsinum?

– Okkum dámar væl kongshúsið, og tað er heilt víst góð reklama fyri Danmark, at tey hava eitt kongshús

Er tað rætt, at løgmaður og løgtingsformaðurin við konum fóru í brúdleyp?

– Ja, avgjørt. Tað er í fínasta lagi, og tað er gott, at onkur umboðar Føroyar, tí vit eru hóast alt ein partur av danska ríkinum.

Kári Reynheim, montørur

Sjónvarpið var tendrað allastaðnis



Á sínum mongu vitjanum úti hjá viðskiftafólki fríggjadagin, kundi telemontørurin Kári Reynheim staðfesta, at áhugin fyri kongaliga brúdleypinum var stórur, tí allastaðnis var sjónvarpið tendrað.

Hugdu tú eftir kongaligu vígsluni?

– Eg hugdi í bitum. Eg var til arbeiðis og koyrdi út til viðskiftafólk, og tað var líkamikið, um eg var hjá privatum ella hjá fyritøkum, tí allastaðnis var sjónvarpið tendrað, og á tann hátt sá eg av og á eitt sindur av hátíðarhaldinum.

Hvat heldur tú um, at so nógvur peningur verður brúktur upp á eina kongaliga vígslu?

– Tað man verða í lagi, haldi eg. Danir fáa óivað pengarnar inn aftur fleiri ferðir, tí hatta er góð reklama, ið fer um allan heim.

Er tað rætt av føroyingum at brúka almennar pengar upp á brúdleypið?

– Ja, tað haldi eg. Vit fáa óivað pengarnar aftur á onkran annan hátt. Vit skulu vísa virðing fyri kongshúsinum.

Birgir Kass, sølumaður

Fingu sjampanju tá vígslan var

Fiskasølumaðurin Birgir Kass heldur danska kongshúsið verða virðilig umboð fyri sítt land, og at tey seta Danmark á heimskortið.

Hugdi tú eftir brúdleypinum í sjónvarpinum?

– Eg hugdi av og á, meðan eg var til arbeiðis. Vit hava eitt sjónvarp á Fiskasøluni, og hugt var, tá ið tíð var til tað. Tá ið so sjálv vígslan var, fingu vit sjampanju frá arbeiðsgevaranum. Komin til hús, tímdi eg ikki meir, og tá var oftast skift á onkra aðra rás.

Hvat heldur tú um danska kongshúsið?

– Eg haldi, at tey eru fínir ambassadørar fyri Danmark, og at tey eru við til at seta Danmark á heimskortið. Til dømis eri eg ikki í iva um, at øll í Australia og á Tasmania nú vita, hvar Danmark er, og tað vistu tey neyvan undan brúdleypinum.

Almennu Føroyar hava brúkt pengar upp á umboðan og gávu í sambandi við brúdleypið, hvat heldur tú um tað?

– Sjálvsagt skulu føroyingar fara í brúdleyp, og eg haldi tað verða í fínasta lagi, at løgmaður og løgtingsformaðurin vóru við, og at vit lata brúðarparinum eina gávu.